Nú nærkast fjølmentanarvikan, og fyrireikingarnar ganga framá.

Viðfest er býtið av londum, ið ætlanin er at stovnarnir arbeiða við gjøgnum og undan vikuna. Ætlanin er, at áðrenn skrúðgonguna, hava børnini á stovnunum gjørt fløgg frá tillutaðu londunum, at brúka til skrúðgonguna.

Tit gera sjálvandi sjálvi av, hvussu nógv tit gera burturúr fjølmentanarvikuni, men her eru nøkur yvirskipað evnir og hugskot, sum tit kunnu samstarva og taka upp saman:

- Tekna fløgg

Tosa um:

- Hvat eta tey? Hvat mál tosa tey?
- Nær er tjóðardagurin? Hava tey tjóðarbúna og hvussu sær hann út? Hvar liggur landið?
- Ganga børnini í vg/bg/fts?
- Hevur landið ávísan dans, sang/ir, kend fólk?
- Hvør er tjóðarítróttur? Hvørji spøl spæla tey?
- Eru nøkur felags eyðkenni millum Føroyar og londini?

Vit hava valt ein slagsang til vikuna, ið hevði verið stuttligt um børnini kendu, og kanska duga eitt sindur av, "Dugir tú at tosa føroyskt".

Tit finna lagið og sangin á youtube.com: [Lena Anderssen · Dugir Tú At Tosa Føroyskt · Official Video (youtube.com)]

**Skrúðgonga og setan av fjølmentanarvikuni mánadagin 28.okt.**

Øll møta á ovara vølli í Gundadali millum kl 9.30 og 10.00, har Rógvi Dam stendur og bíðar eftir okkum. Stovnar hava eitt skelti ella líknandi við, sum eyðkennir teirra stovn, og børnini hava tey heimagjørdu fløggini við. Har standa fólk og taka ímóti, og vísa tykkum hvar tit skulu vera. Somuleiðis er viðfest eitt yvirlit yvir vøllin, har tit síggja hvar tykkara pláss er. Tit fáa serlig fløgg útflýggjað, ið skulu setast við Havnará, tá skrúðgongan kemur oman á Vaglið. Hesum vísa hjálparfólk tykkum á, tá gongan kemur oman til Vaglið.

Kl. 10.15 byrjar skrúðgongan, leiðin er frámerkt á viðfesta korti. Ein festligur brandbilur koyrir fremst, við góðum tónleiki frá. Rógvi er við á súkklu, og kemur at ferðast runt í gonguni, so øll kunnu vera í góðum lag.

Tá gongan kemur oman til Sjónleikarhúsið steðga vit á eina løtu, og fara at syngja "Høvd, akslar, knø og tær" saman, áðrenn gongan fer víðari oman á Vaglið, har frásøgufólkið kemur at standa á pallinum og taka ímóti okkum. Tá tit koma gangandi oman á Vaglið, fara børnini, ið hava fingið serligu fløggini, við einum starvsfólki frá tykkara stovni, yvir til Havnará og seta fløggini í gjørda handlistan, og fara síðani aftur har tykkara stovnur stendur.

Tá øll eru komin uppá pláss aftur, er skráin á pallinum hendan:

- Heðin Mortensen, borgarstjóri, setur fjølmentanarvikuna
- Dagstovnur framførur
- Sangframførsla
- Dagstovnur framførur
- "Veturin komin við kulda og kava" verður kvøðin
- Dagstovnur framførur
- Fjøldin syngur "Dugir tú at tosa føroyskt"
- Framsøgufólk takkar fyri og øll fara heim

**Tað tit skulu hugsa um til skrúðgonguna, er, at:**

- Børnini tekna fløgg av londunum, ið tit hava fingið tillutað, at hava við í skrúðgonguni
- Tit hava skelti, flagg ella líknandi við, sum eyðkennir tykkara stovn

- Tit velja eitt barn fyri hvørt land tit hava fingið tillutað, at seta flagg í handlistan við Havnará (og starvsfólk at fylgja teimum). Hesi fløgg fáa tit á ovara vølli áðrenn skrúðgongan byrjar
- Møta á ovara vølli millum kl.9.30 og 10.00.

Enn er pláss fyri stovni at framføra á pallinum, men so er at gera skjótt av, og boða frá hjá [annhan@torshavn.fo.](mailto:annhan@torshavn.fo)

Vit viðurkenna at tíðspunktið fyri setanina ikki er góð fyri frítíðarskúlarnar, men vilja heita á tykkum um at royna at fáa eitt samstarv í lag við skúlarnar, so tað ber til at verða við.

Vinarliga

Fyrireikingartoymið (Allan, Maud, Vivi, Salua og Ann)

Multicultural Week Fjølmentanarvikan

